Tórshavnar kommuna
Endurnýtslan
Postboks 32
á Hjalla
110 Tórshavn

Argir, hin 29. mai. 2008
Málnr.: US-41206-028/08/13
Tykkara málnr.:
Málsviðgeri: EE

# Umhvørvisgóðkenning
# av
# jarnmóttøkuplássinum á Sandvíkarhjalla

Henda umhvørvisgóðkenning av jarnmóttøkuplássinum á Sandvíkarhjalla, matr. nr. 1oi, 1oh og 1mg í Hoyvík, er givin við heimild í grein 26 í løgtingslóg nr. 134 frá 29. oktober 1988, um umhvørvisvernd, og grein 1, nr. 4 og 4a í kunngerð nr. 54 frá 3. mai 1994, sum broytt í grein 5, nr. 1 og 4 í kunngerð nr. 90 frá 28. september 2007, um at leggja eftirlits- og umsitingaruppgávur eftir umhvørvisverndarlógini til Umhvørvisstovuna.

## 1 Endamál
Endamálið við umhvørvisgóðkenningini er at fyribyrgja og avmarka dálking av náttúru og umhvørvi og ampa, sum kann standast av virkseminum.

## 2 Umsóknin
Umsókn um umhvørvisgóðkenning av jarnplássinum hjá Kommunalu Brennistøðini á Sandvíkarhjalla varð send til Heilsufrøðiligu starvsstovuna, sum tá var umhvørvismyndugleiki, hin 17. august 2006.

Saman við umsóknini varð móttikið

- matrikkulkort, sum er ein útskrift frá Føroya Dátusavn, dagfest 15-8-2006.
- bygningstekningar av bilhøll og tappistøð, sum stendur á matrikul nr. 1oi, umfatandi síðu og endamyndir (tekning nr. 602, dagfest 27-1-06, planmynd (tekning 601-1, dagfest 27-1-06, tvørskurður vísandi økisuppbýti (tekning nr. 601-11, dagfest 23-6-06) umframt skurð (tekning 603, dagfest 27-1-06).
- kloakkskipanin er víst á tekning 601-1 (sama sum bygningstekningar) fyri matrikul nr. 1oi. Fyri 1oh er kloakkskipanin víst á tekning 1C, dagfest 05.05.98, og kloakkskipanin á matrikul 1mq er víst á tekning 4B, dagfest 12.08.85.
- loftmynd, dagfest 11-04-06, verður brúkt sum yvirlitskort umframt sum stuðul til frágreiðingina (flowdiagramm).

Harumframt er móttikin frágreiðing um ætlaða virksemið, umframt ætlaðar broytingar í mun til verandi virksemi.

Tað móttikna tilfarið hevur verið grundarlag undir viðgerðini av umsóknini.

**Umhvørvisstovan** · Traðagøta 38 · Postboks 2048 · FO-165 Argir · Føroyar · Tlf: +298 34 24 00 · Fax: +298 34 24 01 · us@us.fo · www.us.fo

## 3 Lýsing av virkinum
Nágreinilig lýsing av virkinum sæst í **fylgiskjali 2**.

## 4 Viðgerð
Uppskot til umhvørvisgóðkenning varð sent til Tórshavnar kommunu tann 26. oktober 2006 (HS mál 200600541-4, US málnr. 41206-028/08-4). Umhvørvismyndugleikin fekk viðmerkingar frá Tórshavnar kommunu tann 4. desember 2006 (HS mál 200600541-6, US málnr. 41206-028/08-6). Hesar viðmerkingar hevur umhvørvismyndugleikin tikið til eftirtektar í tann mun tað hevur verið møguligt.

Undir viðgerðini er serligur dentur lagdur á:

- At umhvørvisdálkandi evni ikki verða leidd út í umhvørvi
- Dálkingaravmarkandi tiltøk um óhapp henda
- At økja um endurnýtslu
- At innaneftirlit, umhvørvisstýriskipan og skrásetingar eru sambært viðurkendum skipanum

## 5 Góðkenningartreytir
Umhvørvisgóðkenningin er givin við niðanfyri nevndu treytum. Harumframt eru **góðkenningartreytirnar í fylgiskjali 1** galdandi.
Um ósamsvar er millum treytirnar niðanfyri og treytirnar í fylgiskjali 1, eru treytirnar niðanfyri galdandi.

### 5.1 Innrætting

5.1.1 Plássið skal innrættast og rekast, sum ávíst í móttiknum tilfari (HS mál nr. 200600541-3, US málnr. 41206-028/08-3. Tykkara ref. nr. 2004-2745/3-SG)

5.1.2 Allar frárenningar, umframt kantur um tangagoymsluna, skulu vera gjørdar í seinasta lagi 6 mánaðir eftir at endaliga góðkenningin er fingin.

5.1.3 Frárenningin frá umhvørvisviðgerðarhøllini á matr. 1oi skal verða samlað upp.

5.1.4 Dekkið á øllum plássum skal vera stoypt ella asfalterað, hetta kann gerast so hvørt sum økini verða atkomilig, men skal vera liðugt í seinasta lagi 1. januar 2009.

5.1.5 Dekkið á øllum plássum ið nýtt verða til annaðhvørt goymslu ella viðgerð skulu hava eitt ávíst hall, so vatn kann renna frá økinum og í góðkendan savningarbrunn.

5.1.6 Einki vatn frá økinum rundanum má renna inn á økið.

5.1.7 Alt økið skal vera girt inni við 2 metra høgum hegni.

5.1.8 Økið skal kunna læsast fyri óviðkomandi.

### 5.2 Bilvraksmóttøkan og umhvørvisviðgerð av bilvrakum:

5.2.1 Bilvrak, sum koma inn til umhvørvisviðgerð, verða viðgjørd sambært fylgiskjali 2 skjótast gjørligt, og í seinasta lagi ein mánað eftir móttøku.

5.2.2 At fremja endurnýtslu verður áhaldandi kannað, hvørjir møguleikar eru at endurnýta tilfar úr bilvrakum, t.d. rútar, plastikk, selastrammarar og airbags.

## 5.3 Jarnplássið

5.3.1 Alt metal skal skiljast soleiðis at so nógv sum møguligt kann endurnýtast.

## 5.4 Goymslur

5.4.1 Goymslur av teimum í pkt. F2-1.1, F2-1.2 og F2-1.3 lýstu evnunum og tilfarinum, sum kann hava dálking við sær, skulu vera vardar ímóti regni og vindi og hóast lekar skal innihaldið í tí størsta ílatinum kunna haldast aftur av savningarbrunni. Goymslan skal kunna læsast fyri óviðkomandi.

5.4.2 Tiltøk mugu verða sett í verk at tryggja, at eldur ikki kemur í goymsluna av dekkum. Sum partur av hesum má tryggjast ímóti at ov stór nøgd verður samlað á einum staði. Video-eftirlit og vaktarhald eru partur av eftiransing, umframt at brunaumsjónarmaðurin í Tórshavnar kommunu metir um hvørji tiltøk skulu setast í verk.

5.4.3 Tangagoymslur mugu vera á platti við so høgum kanti rundanum, at platturin kann halda øllum innihaldinum av tí størsta tanganum, sum stendur yvir jørð. Einki frárensl má verða úr hesum platti.

## 5.5 Frárenningarvatn

5.5.1 Frárenningarvatnið frá øllum økinum skal leiðast gjøgnum hóskandi reinsiskipan, so sum góðkendan oljuútskiljara við sandfangi.

5.5.2 Oljuútskiljarin skal hava sjálvvirkandi flotlæsara og ávaringarskipan, ið boðar frá, tá ið hann skal tømast.

5.5.3 Oljuútskiljarin skal tømast eftir tørvi, men í minsta lagi tvær ferðir um árið.

5.5.4 Sýnistøkubrunnur, ið ger tað møguligt at taka sýni av frárenningarvatninum, skal vera eftir oljuútskiljara.

5.5.5 Fyri at avmarka útleiðingina mest møguligt, skal møguligt spill av olju ella øðrum takast upp og burturbeinast, áðrenn undirlagið verður spulað.

5.5.6 Einki frárenningarvatn má bera brá av olju ella aðrari dálking.

## 5.6 Sýnistøkur

5.6.1 Eina ferð um árið skulu sýni takast av frárensluvatninum, úr sýnistøkubrunni eftir oljuútskiljara. Títtleikin av sýnistøkum kann verða broyttur av Umhvørvisstovuni. Somuleiðis kann verða broytt hvørji evni, sum kannast skal fyri. Vatn úr sýnistøkubrunni skal kannast sambært Talvu 1.

| Parametur | Markvirði mg/l |
|---|---|
| Cadmium (Cd) | 0,2 |
| Nikkel (Ni) | 0,5 |
| Kyksilvur (Hg) | 0,03 |
| Zink (Zn) | 1,5 |
| Blýggj (Pb) | 0,5 |
| Krom (Cr) | 0,2 |
| Kopar (Cu) | 0,2 |
| Phenol | 0,2 |
| Mineralolja | 10 |
| pH | 6,0 – 9 |

**Talva 1**

5.6.2 Fýra ferðir tað fyrsta árið eftir, at øll viðurskifti viðvíkjandi frárenslum eru komin í rættlag, skal vatn úr sýnistøkubrunni kannast sambært Talvu 2. Aftaná at Umhvørvisstovan hevur móttikið úrslitið av hesum kanningum verður støða tikin til, um neyðugt er við framhaldandi kanningum.

| Parametur | Viðmerkingar |
|---|---|
| Aromatiskar kolvetnur (benzen, naphtalen, toluen og xylen'ir (p, m, o) | Má ikki leiðast út |
| PCB (28, 52, 101, 118, 138, 153 og 180) | Má ikki leiðast út |

**Talva 2**

## 5.7. Rakstarskráseting/umhvørvisfrágreiðing

5.7.1 Virkið skal skráseta hesar upplýsingar:

- Rakstrartrupulleikar/óhapp
- Kanningarúrslit fyri útleiðingar
- Innkomnar nøgdir av jarni/skrotti
- Avskipaðar nøgdir av jarni/skrotti
- Hvørjum jarn/skrott verður móttikið frá
- Hvør keyparin ella móttakarin er av jarni/skrotti
- Hvussu ofta verður jarn/skrott avskipað
- Innkomnar nøgdir av dekkum
- Hvørjum dekk verða móttikin frá
- Avskipaðar nøgdir av dekkum
- Hvussu ofta dekk verða avskipað
- Hvør móttakarin er av dekkum og hvat tey verða brúkt til (orkubrenning ella endurnýtslu)
- Nøgdir av vandamiklum burturkasti og avtakari
- Nøgdir av avtappaðum CFC og CFC-líknandi evnum og avtakari
- Uppgerðir av burturkasti til Kommunalu Brennistøðina og tyrvingarplássið í Húsahaga
- Onnur viðurskifti av umhvørvisligum týdningi

5.7.2 Skrásetingarnar smb. pkt. 5.7.1. skulu verða eftir galdandi kotum í europeiska burturkasts kataloginum og nýtast skulu 6 siffur, umframt at burturbeiningarhátturin skal skrásetast. Vandamikið burturkast skal eisini skrásetast eftir vandabólki.

5.7.3 Rakstrarskrásetingarnar skulu til eina og hvørja tíð kunna síggjast av eftirlitsmyndugleikanum og skulu goymast í 5 ár.

5.7.4 Árlig umhvørvisfrágreiðing við uppgerð av rakstrarskrásetingum og frágreiðing um umhvørvisviðurskifti, tulking av kanningarúrslitum, óhapp, gjørd og ætlað umhvørvistiltøk v.m. skal sendast Umhvørvisstovuni í seinasta lagi 1. mai í avloysandi árinum.

5.7.5 Umhvørvisstovan skal kunnast um allan útflutning hjá Jarnplássinum: slag, nøgd, vandaklassa og móttakara.

### 5.8 Innaneftirlit / Umhvørvisstýriskipan

5.8.1 Hendan umhvørvisgóðkenning, við møguligum broytingum og dagføring, skal altíð finnast á virkinum og skulu øll viðkomandi starvsfólk kenna innihaldið og vera kunnað um ta lóggávu, sum góðkenningin er grundað á.

5.8.2 Virksemið á jarnplássinum skal samskipast við umhvørvisskipanina á brennistøðini hjá Tórshavnar kommunu.

5.8.3 Kanningar, sum eru ásettar í hesi góðkenning, kunnu broytast, herundir víðkast til onnur sýnissløg og fleiri parametrar, eftir nærri áseting frá Umhvørvisstovuni.

5.8.4 Títtleikin av sýnistøku kann verða broyttur av Umhvørvisstovuni.

5.8.5 Allar sýnistøkur og kanningar skulu gerast av starvsstovu, sum kann góðkennast av Umhvørvisstovuni.

5.8.6 Allar sýnistøkur, kanningar og metingar av úrslitum verða goldnar av jarnplássinum.

## 6 Kæruvegleiðing

Hendan avgerð kann sambært grein 66 í løgtingslóg nr. 134 um umhvørvisvernd frá 29. oktober 1988 kærast til landsstýrismannin við umhvørvismálum. Kæran skal sendast Umhvørvisstovuni, sum síðan sendir hana til landsstýrismannin við umhvørvismálum saman við neyðugum skjølum.

Kærufreistin er fýra vikur frá tí degi, umhvørvisgóðkenningin er almannakunngjørd. Um kærufreistin er úti ein leygardag ella ein halgidag, verður kærufreistin longd til tann fyrstkomandi gerandisdagin.

Jóhanna Olsen, deildarleiðari / Eyð Eidesgaard, umhvørvisviðgeri

**Hjálagt:** Fylgiskjal 1: Almennar góðkenningartreytir
Fylgiskjal 2: Lýsing av virkinum

**Avrit:** Landslæknin

umhvørvisstovan

**Fylgiskjal 1**

# Góðkennningartreytir

## F1-1 Innrætting og rakstur

F1-1.1 Virkið skal rekast soleiðis, at treytirnar í hesi góðkenning altíð verða hildnar.

F1-1.2 Øki, sum hoyra til virkið, skulu verða týðiliga avmerkt.

F1-1.3 Virkið skal halda øll útlát so lág sum gjørligt. Miðast skal eftir at nýta bestu tøku tøknina (BAT[1]), og skal tøka reinsiútgerðin altíð nýtast til fulnar.

F1-1.4 Miðast skal eftir at nýta evni og tilfar, ið hava minst møguligt árin á umhvørvið.

F1-1.5 Um virksemið heldur uppat, skal alt tilfar og øll útgerð beinast burtur.

## F1-2 Goymslur

F1-2.1 Evni og tilfar, ið kunnu dálka, skulu goymast soleiðis, at einki útlát til umhvørvið kann fara fram. Goymslur skulu innrættast soleiðis, at møguligir lekar og spill kunnu haldast aftur.

F1-2.2 Evni, ið eru á goymslu uttandura, skulu vera í íløtum, sum eru góðkend til uttandura goymslu av viðkomandi evni.

## F1-3 Óljóð, ristingar og ljós

F1-3.1 Óljóð[2] frá virkseminum má ikki fara upp um virðini í talvu F1-1.

**Talva F1-1:** Markvirði fyri óljóð - dB(A)

| Dagur | Tíð | Øki 1 | Øki 2 | Øki 3 | Øki 4 |
|---|---|---|---|---|---|
| Mána- fríggjadag | 07.00 - 18.00 | 70 | 60 | 55 | 45 |
| Leygardag | 07.00 - 14.00 | 70 | 60 | 55 | 45 |
| Mána- fríggjadag | 18.00 - 22.00 | 70 | 60 | 45 | 40 |
| Leygardag | 14.00 - 22.00 | 70 | 60 | 45 | 40 |
| Halgidagar | 07.00 - 22.00 | 70 | 60 | 45 | 40 |
| Allar dagar | 22.00 - 07.00 | 70 | 60 | 40 | 35 |

Øki 1: Vinnuøki og havnarøki, har larmandi virksemi kann fara fram.
Øki 2: Vinnuøki og havnarøki, har minni larmandi virksemi kann fara fram.
Øki 3: Blandað bústaðar- og miðstaðarøki.
Øki 4: Bústaðarøki.

F1-3.2 Í tíðarskeiðinum kl. 22-07 kann óljóð (løtuvirði) í bústaðarøkjum (øki 3 og 4) í mesta lagi fara 15 dB(A) upp um omanfyrinevndu markvirði.

F1-3.3 Virksemið skal ikki hava við sær ampa av óljóði, íroknað lág- ella háfrekventum óljóði, ristingum, ljósi ella geislingum. Um ampi verður av hesum, skulu neyðug tiltøk setast í verk.

## F1-4 Útleiðing til luft

F1-4.1 Virksemi má ikki hava við sær ampa av royki, lukti ella dusti uttan fyri øki virkisins.

F1-4.2 Allar útleiðingar til luft skulu førast uppeftir.

---

[1] Best Available Techniques.
[2] Ásett sum tað ekvivalenta, korrigeraða óljóðstøðið í dB(A) í viðkomandi økjum sambært kommunalu byggisamtyktini.

F1-4.3 Um ampi verður av royki, lukti, dusti ella øðrum, skulu avmarkandi tiltøk setast í verk.

## F1-5 Spillivatn

F1-5.1 Alt spillivatn skal leiðast í kommunalu spillivatnsleiðingina

F1-5.2 Eru dálkandi evni í spillivatninum, skal ein hóskandi reinsiskipan nýtast, so sum olju- ella feittskiljari.

F1-5.3 Reinsiskipanir til spillivatn skulu reinsast og røkjast soleiðis, at tær altíð virka til fulnar.

F1-5.4 Tað skal vera gjørligt at taka sýni av reinsaða spillivatninum.

F1-5.5 Spillivatnið skal yvirhalda markvirðini í Talvu F1-2.

**Talva F1-2:** Markvirði fyri spillivatn

| Evni | Markvirði | Kanningarháttur |
|---|---|---|
| Olja (mineral) | Max. 10 mg/l | DS/R 208 |
| Olja/feitt | Max. 50 mg/l | DS/R 208 |
| Botnfelliligt evni | Max. 10 ml/l | DS 233 |
| Suspenderað evni | Max. 300 mg/l | DS 207 |
| pH | 6 - 9 | |

## F1-6 Burturkast

F1-6.1 Alt burturkast skal handfarast í samsvari við galdandi reglur um burturkast[3].

F1-6.2 Burturkast skal goymast soleiðis, at tað ikki er til ampa.

F1-6.3 Burturkastið skal latast góðkendum móttakara, og skal skiljast sambært ásetingum móttakarans.

## F1-7 Óhapp

F1-7.1 Har vandi er fyri spilli av evnafrøðiligum evnum, skal arbeiðast á skynsaman hátt, so at dálking ikki stendst av hesum.

F1-7.2 Virkið skal hava mannagongdir til fyribyrging av dálkingaróhappum og til upprudding eftir møgulig óhapp.

F1-7.3 Virkið skal, um neyðugt, hava útgerð til upprudding eftir møgulig dálkingaróhapp.

F1-7.4 Henda dálkingaróhapp, skulu beinanvegin setast í verk tiltøk til avmarking og upprudding.

F1-7.5 Størri útlát ella dálking skal beinanvegin fráboðast Umhvørvisstovuni. Eisini skal ein frágreiðing um orsøk og møgulig tiltøk til upprudding v.m. sendast Umhvørvisstovuni [4].

---

[3] Kunngerð nr. 147 frá 19-10-1995, um burturkast, og kunngerð nr. 40 frá 09-04-1992, um lívrunnið burturkast frá alivinnuni.

[4] Dálkingaróhapp skulu eisini fráboðast til Løgregluna (dálking á landi) ella til Sjóbjargingarstøðina, MRCC-Tórshavn (dálking á sjónum).

umhvørvisstovan

## F1-8 Innaneftirlit

F1-8.1 Virkið skal altíð tryggja sær, at treytirnar í hesi góðkenning verða hildnar, um neyðugt við at gera egnar mátingar og skrásetingar.

F1-8.2 Umhvørvisstovan kann krevja, at virkið skal skjalprógva, at treytirnar í 3. parti, um óljóð, ristingar og ljós, í 4. parti, um útleiðing til luft, og í 5. parti, um spillivatn, verða hildnar.

F1-8.3 Umhvørvisstovuni kann krevja, at virkið ger serligar kanningar fyri at meta um møgulig dálkingarárin frá virkinum.

F1-8.4 Sýnistøkur og kanningar skulu gerast av persóni ella felag, sum Umhvørvisstovan kann góðtaka.

F1-8.5 Sýnistøkur og kanningar skulu gjaldast av virkinum.

## F1-9. Rakstrarskráseting

F1-9.1 Virkið skal skráseta hesar upplýsingar:

- Nøgd og slag av rávørum og kemikalium. Databløð fyri øll kemikaliu skulu verða tøk.
- El- og oljunýtsla.
- Avhendaðar nøgdir av burturkasti við tilskilan av slagi og móttakara.
- Røkt av reinsiskipanum.
- Óhapp, sum hava havt útlát ella vanda fyri útláti við sær.
- Úrslit og eygleiðingar (checklistar) í sambandi við innaneftirlit.

F1-9.2 Skrásetingarnar skulu goymast í minsta lagi í 5 ár, og teir skulu vera til taks hjá Umhvørvisstovuni.

F1-9.3 Virkið skal eftir umbøn frá Umhvørvisstovuni senda inn rakstrarskrásetingar, úrslit av mátingum o.a. í hóskandi uppseting.

F1-9.4 Umhvørvisstovan kann krevja aðrar skrásetingar enn tær, ið eru nevndar undir F1-9.1.

## F1-10 Almennar treytir

F1-10.1 Boðast skal Umhvørvisstovuni frá, tá ið farið verður undir virksemið.

F1-10.2 Gongur meiri enn eitt ár, áðrenn farið er undir ætlanina, fellur umhvørvisgóðkenningin burtur.

F1-10.3 Virkið má ikki víðkast ella broytast byggifrøðiliga ella rakstrarliga á ein hátt, ið økir dálkingina, uttan nýggj góðkenning er givin.

F1-10.4 Góðkenningin skal altíð vera tøk á virkinum. Øll viðkomandi starvsfólk skulu kenna innihaldið í góðkenningini og vita, hvar góðkenningin er til taks.

F1-10.5 Eigaraskifti, navnabroyting ella avtøka skal fráboðast Umhvørvisstovuni.

F1-10.6 Umhvørvisstovan hevur eftirlitið við virkinum. Eftirlitið verður útint sambært kap. 7 í umhvørvisverndarlógini.

F1-10.7 Í 5 ár eftir at góðkenningin er givin, kunnu nýggjar treytir bert ásetast, um so er, at:

- nýggjar upplýsingar eru komnar fram um dálkingarárin.
- dálkingin elvir til umhvørvislig árin, ið ikki vóru kend, tá ið góðkenningin varð givin.
- dálkingin í aðrar mátar verður størri enn hon, ið góðkenningin er givin eftir.

F1-10.8 Aftan á fimm ár kann Umhvørvisstovan broyta treytirnar í hesi góðkenning, tá ið tað er umhvørvisliga grundað.

F1-10.9 Henda góðkenning tekur ikki støðu til, um tað er neyðugt við øðrum góðkenningum

**Fylgiskjal 2**

# Lýsing av virkinum

Virkið er á matr. nr. 1io, 1oh og parti av 1mq í Hoyvík
Matr. nr. 1io er 4.202 $m^2$ við ástandandi bygningi. Matr. nr. 1oh er 6.402 $m^2$ uttan bygning. Matr. nr. mq er tilsamans 10.938 $m^2$ við tveimum ástandandi bygningum og einum úthúsi, av hesum stykki verður søkt um umhvørvisgóðkenning av 1.500 $m^2$, uttan bygningar.
Virksemið á matrikul nr. 1io fevnir um teir aktivitetir sum knýttir eru at umhvørvisviðgerð av bilvrakum, vaskipláss til bilar hjá Kommunalu Brennistøðini, parkeringspláss og bilhús til renovatiónsbilar, umframt pláss til vanliga parkering. Harumframt verður nakað av virksemi av skrivstovuhaldi og framsýningum.
Av hesum virkseminum kann standast nakað av dálking, serliga av olju og loysingarevnum, og tí er umráðandi at økið er í minsta lagi asfalterað áðrenn tað verður tikið í nýtslu. Harumframt skal økið hava frárensl, uppsamling, sandfang og oljuútskiljara. Hetta er tó ikki galdandi fyri øki til vanliga parkering.
Talmerkingarnar, sum eru nýttar á loftmyndini, sum Umhvørvisstovan fekk saman við umsóknini, eru nýttar til at eyðmerkja økir í hesi góðkenning.
Virkið roknar við at taka ímóti umleið 5.000 tonsum av jarni og øðrum metalum um árið, herav eini 1.000 smærri bilar og 25 størri bilar. Roknað verður við at taka ímóti uml. 300 tonsum av bildekkum um árið. Av vandamiklum burturkasti verður árliga roknað við 10-15 tonsum av akkumulatorum, 4-5.000 litrum av spillolju, umleið 1.000 oljufiltrum, 2-3.000 litrum av frostvesku, 1.000 litrum av sprinklaravesku, 0,5 kg av kyksilvurkontaktum og umleið 10 kg av bremsuklossum við asbest.

**F2-1 Bilvraksmóttøkan og umhvørvisviðgerð av bilvrakum:**

F2-1.1 Bilvrak sum koma inn til umhvørvisviðgerð verða tømd fyri:

- Brennievni (bensin/diesel)
- Motorolju
- Bremsivesku
- Gearolju
- Hydraulikkolju
- Kølaravesku
- Sprinklaravesku
- Koblingsvesku
- CFC og CFC-líknandi evni í køli- og frystiútgerð

Veskurnar verða pumpaðar í goymslutangar, og verða síðan endurnýttar ella útfluttar til serviðgerð.

F2-1.2 Akkumulatorar verða tiknir úr bilvrakunum.

F2-1.3 Áðrenn bilvrak verða koyrd í pressuna verða tey tømd fyri:

- Bremsibelegningar sum innihalda asbest
- Balansuklossar sum innihalda blýggj
- Katalysatorar
- Kyksilvurkontaktir
- Oljufiltur

F2-1.4 Eisini verður tikið av/úr bilvrakunum:

- Dekk
- Elektronisk útgerð (útvarps- og sjónvarpsútgerð, navigatiónsútgerð og fartelefonir)